# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 11/00117 | Lóg: Meirvirðisgjaldslógin § 1, § 11, § 15 | Avgerð tikin: 24.11.2011 |
|---|---|---|

**Rindan av mvg í sambandi við keyp av báti. Avgerð annullerað.**


**Samandráttur:**

**Kært er um avgerð hjá TAKS, at kærarin skal rinda 825.000 kr. í mvg til seljaran í sambandi við keyp av báti. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið avgerð um, at TAKS hevur ikki grundarlag fyri at taka avgerð um, at kærarin skal rinda mvg'ið til seljaran, og nevndin hevur tí avgjørt at annullera/heva avgerðina hjá TAKS. Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at støða ikki er tikin til, um mvg sambært mvg-lógini átti at verið rindað í hesum føri.**


**Avgerð**

**Kært er um** avgerð hjá TAKS, at kærarin skal rinda 825.000 kr. í mvg til seljaran í sambandi við keyp av báti.

**Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
TAKS hevur tikið avgerð um, at kærarin, sum er keyparin av tí báti, sum er umrøddur í málinum, skal rinda mvg til seljaran av bátinum.

At byrja við kann viðmerkjast, at tað framgongur av ásetingunum í mvg-lógini, herundir av §§ 1, 11 og 15, at skyldan at uppkrevja og inngjalda mvg í sambandi við mvg-skylduga sølu áliggur seljaranum. Hetta merkir, at um mvg ikki er uppkravt ella ov lítið mvg er uppkravt av mvg-skyldugari sølu, kann TAKS rætta eitt krav móti seljaranum hesum viðvíkjandi. Keyparin hevur onga skyldu viðvíkjandi mvg'num í hesum sambandi.

TAKS hevur heldur ikki grundarlag fyri at taka avgerð um, at keyparin skal rinda mvg'ið til seljaran av bátinum, sum er gjørt í hesum føri. Her er tað avtalan millum partarnar, sum er galdandi. Sum málið er upplýst, má avtalan millum partarnar vera, at kærarin skal rinda 3,3 mió. kr. til seljaran fyri bátin. TAKS kann ikki áseta, at keyparin skal rinda eina aðra upphædd.

Hervið er ikki sagt, at TAKS ikki kann regulera mvg-grundarlagið, men hetta er eitt mál millum TAKS og seljaran av bátinum.

**Vísandi til omanfyri standandi hevur TAKS ikki grundarlag fyri at taka avgerð um, at kærarin skal rinda mvg'ið til seljaran, og nevndin hevur tí avgjørt at annullera/heva avgerðina hjá TAKS. Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at støða ikki er tikin til, um mvg sambært mvg-lógini átti at verið rindað í hesum føri.**